# Nú lætnar yvir Læraraskúlanum

**Næmingar í 3.p í pedagogskúlanum hava á fundi í Mentamálaráðnum fingið tilsøgn um, at tað verður betri skil á útbúgvingin komandi skúlaár**

ÚTBÚGVING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*




*nú letur til, at skýggini so smátt lætna yvir Læraraskúlanum*

Nú royna fólk at koma nógva rumblinum um pedagogútbúgvingina til lívs, við í staðin at byggja upp ein meira konstruktivan dialog millum partarnar.

Í gjár vóru nøkur umboð fyri 3.p á fundi í Mentamálaráðnum saman við formanni Pedagogfelagsins og rektarunum á ávikavist Læraraskúlanum og Setrinum.

- Fundurin var góður og siðiligir, og nú hava vit vón um, at viðurkiftini batna, tá vit koma í skúla aftur í august, sigur Bjørt Joensen Dahl, sum hevur umboðað flokkin úteftir í málinum.

Tað var í síðstu viku, at næmingar á 2. og 3. árgangi á pedagogútbúgvingini kærdu sína neyð til Mentamálaráðið. Eisini fingu teir stuðul frá næmingum, sum luku útbúgving á skúlanum í fjør. Millum annað varð funnist at kunningini frá leiðslu skúlans, og at tey høvdu ikki fingið allar undirvísingartímar.

Bjørt Joensen Dah greiðir frá, at kravið um betri kunning, skikkaðar lærarar og sum heild gjøgnumskygni í útbúgvingini vórðu viðgjørd í Mentamálaráðnum í gjár. Og at tey nú hava vón um, at í øllum førum hesi viðurskiftini koma upp á pláss skjótast.

- Men krøvini eru heldur ikki órímilig. Hetta er alt slíkt, sum átti at verið í lagi, so tað ber saktans til at fáa tey í rættlag, sigur Bjørt Joensen Dahl við Sosialin.

Hóast tey eru vónrík og nøgd við avrikið, undirstrikar hon, at hetta bara fevnir um málið hjá 3.p.

- Kæran er framvegis til viðgerðar og gongur sína gongd við hoyringum og so víðari. Og vit hava onki við málini hjá 2.p ella koyrdu lærarunum at gera. So har eru framvegis fleiri vinklar, sum skulu viðgerast, áðrenn viðurskiftini á skúlanum eru komin í rættlag aftur, sigur hon við Sosialin.

Men, sum sagt, so eru næmingarnir í 3.p vónríkir og vóna, at málið, sum byrjaði so negativt, nú vendir til nakað positivt fyri teirra viðkomandi.

UPP- & AFTURLATINGARTÍÐIR

Svimjihøllin verður opin allan dagin í summarfrítíðini, undantikið mikudag og sunnudag, frá mánad. 22/6-2009 til fríggjad. 7/8-2009



*Tíðirnar eru hesar:*

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 06.45 - 20.00 |
| Týsdag | kl. 06.45 - 20.00 |
| Mikudag | kl. 06.45 - 09.00 |
| Hósdag | kl. 06.45 - 20.00 |
| Fríggjadag | kl. 06.45 - 20.00 |
| Leygardag | kl. 09.00 - 17.00 |
| Sunnudag | kl. 08.00 - 10.00 |
| & | kl. 14.00 - 17.00 |

SVIMJIHØLLIN Í GUNDADALI
Hoydalsvegur 21 · Tel 302070
www.svimjihollin.fo

SAMSKIP




> Samskip søkir eftir formanni til frystigoymsluna í Kollafirði

ENNEMM / SÍA / NM38335

**Starvslýsing:**
Sum formaður fært tú høvuðsábyrgd av øllum tí dagliga arbeiðinum á goymsluni. Tú kemur eisini at hava ábyrgd av, at skrásett verður í telduskipanini á fullgóðan hátt. Formaðurin syrgir í hesum sambandi eisini fyri, at mannagongdirnar framhaldandi vera mentar í HACCP, góðskuskipanini, til tess at tryggja, at heilsufrøðilig krøv og kundans ynskir verða gingin á møti.

**Starvskrøv:**
Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, hevur góð samstarvs- og samskipanarevnir og dugir at samskifta við umhugsni – eisini tá ið harðast leikar á. Eisini vænta vit viðkomandi telduførleika og royndir.

**Seinasta freist** at søkja er 03. juli kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv í einum dynamiskum kappingarumhvørvi
- Eitt óformelt og virkið arbeiðsumhvørvi
- Góðar starvsfelagar og góðar arbeiðsumstøður

**Meira kunning:**
Hevur tú spurningar til starvið, ring vinarliga til Niels Madsen, deildarleiðara hjá Samskipum í Kollafirði, á tlf. 47 77 77 ella skriva til t-post niels.madsen@samskip.com

Løn sambært avtalu.

**Umsókn skal sendast til:**
Samskip P/F
Bryggjan
FO-410 Kollafjørður

> Fyritøkan
Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann størsta bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.